# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 10-03-37-5 | Lóg: Lóg um avgjald av framleiðslu og innflutningi § 2 | Avgerð tikin: 02.11.2010 |
|---|---|---|

## Framleiðsluavgjald. Sjokolátavøra.


**Samandráttur:**

**Kært er um avgerð hjá TAKS um, at kærari skal rinda framleiðsluavgjald av framleiddum sjokolátavørum sambært løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning. Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur avgjørt at staðfesta avgerðina hjá TAKS vísandi til § 2 í lógini um avgjald á framleiðslu og innflutning.**


### Avgerð

**Kært er um** avgerð hjá TAKS um, at kærarin skal rinda framleiðsluavgjald sambært løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning.

### TAKS

Sambært avgerð hjá TAKS framleiðir kærarin sjokolátavørur til víðarisølu. Talan er tí um vinnuliga framleiðslu. Vøran kemur undir toll- og vøruskránummar 1806.31.00 sjokoláta fylt og 1806.32.00 sjokoláta ikki fylt. Bæði numrini eru fevnd við avgjaldi jf. frumskjali 1 til toll- og vøruskránna. Avgjaldið er 40% + 16,00 kr. pr. kg.

Avgjaldið (virðisavgjald) á 40% verður roknað av framleiðsluvirðinum (kostnaðarprísinum) á framleiddu vøruni, og vektgjaldið kr. 16,00 skal gjaldast av hvørjum framleiddum kilo netto.

Kærarin hevur greitt frá, at vøran verður framleidd burtur úr tilfari, sum er keypt frá heilsølum við avgjaldi. Tað er bara sjálv sjokolátan, sum ikki er keypt við avgjaldi, tí hon er í stórpakningi omanfyri 2 kg og er tí avgjaldsfrí eftir Toll- og vøruskránni við innflutningi.

Niðurstøðan hjá TAKS er tí, at kærarin ikki skal gjalda framleiðslugjald av tí partinum av framleiðslutilfarinum, sum er keypt við avgjaldi, men av tí partinum av framleiðslutilfarinum, sum er keypt uttan avgjald, tað er av sjálvari sjokolátuni.

### Avgerðin hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini

Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutning skal avgjald rindast fyri vørur, ið verða fluttar inn, sum ásett í frumskjali 1, 2 og 3 til Toll- og vøruskránna.

Sambært § 2 í somu lóg skal avgjald rindast fyri vørur, sum ásett í frumskjali 1 til Toll- og vøruskránna, ið við vinnuligum endamáli verða framleiddar til sølu.

Kærarin selur sjokolátavørur. Vøran kemur sambært TAKS undir toll- og vøruskránummar 1806.3.00 sjokoláta fylt og nr. 1806.32.00 sjokoláta ikki fylt. Hesar vørur eru fevndar av avgjaldi, jf. frumskjali 1 til Toll- og vøruskránna. Avgjaldið er 40% + 16,00 kr. pr. kg.

Kærarin framleiðir hesa vøru burtur úr tilfari, sum er keypt frá heilsølum. Sjálv sjokolátan er keypt frá heilsølum uttan avgjald, tí hon er í stórpakningi omanfyri 2 kg og er tí avgjaldsfrí eftir Toll- og vøruskránni. Onnur vøra, sum inngongur í framleiðsluna, er keypt við avgjaldi.

Tað, at smelta sjokolátu um til konfekt o.s.fr. er ein framleisla av sjokolátu/sjokolátavøru og ikki bert ein handfaring av sjokolátuni.

Tá talan er um framleiðslu til víðarisølu og ikki til privata nýtslu, er talan um framleiðslu við vinnuligum endamáli.

Framleiðslan er tí fevnd av lógini, og tað hevur í hesum sambandi ikki týdning, at framleitt verður við hond og ikki við framleiðslutólum.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tí avgjørt at staðfesta avgerðina hjá TAKS um, at kærarin skal rinda framleiðsluavgjald av framleiddum sjokolátavørum, jb. § 2 í lógini um avgjald á framleiðslu og innflutning.**